TALGILDU
FØROYAR
01100110 01101111

# Undangóðkenning av veitarum til rakstur av Talgildum Samleika

***Um Talgildu Føroyar og Talgildan Samleika***

*Talgildur Samleiki er ein av fýra høvuðstættum í verkætlanini Talgildu Føroyar.*

*Talgildu Føroyar er verkætlan, sum hevur til endamál at menna og seta á stovn eitt talgilt undirstøðukervi fyri Føroyar. Við at seta í verk átøkini í Talgildu Føroyum er grundarlag fyri, at virki og stovnar kunnu menna talgildar tænastur til borgarar at gera nýtslu av, grundað á felags loysnir og standardir.*

*Talgildur Samleiki hevur til endamál, at menna og seta á stovn* ***eina*** *føroyska loysn til allar borgarar og virki, at eyðmerkja seg við og at gera flytingar, at skriva undir og gera aðrar løgfrøðiliga bindandi transaktiónir á talgildum tænastum.*

*Lesið meiri um Talgildu Føroyar á heimasíðuni [www.talgildu.fo](http://www.talgildu.fo) og á facebook síðuni [www.facebook.com/talgildufo](http://www.facebook.com/talgildufo)*

KT Landsins skal gera sáttmála um rakstur av Talgildum Samleika (TS), og í hesum sambandi verður farið undir eina tilgongd, at finna veitara(r) sum kann standa fyri rakstrinum. Fyrsta stig í hesari tilgongd er ein undangóðkenning (prækvalifikatión), har tað er møguligt hjá áhugaðum veitarum at bjóða seg fram sum veitari av rakstrinum.

Teir veitarar, sum verða undangóðkendir (prækvalificeraðir), verða partar av eini tilgongd við uppbygging av vitan um rakstur av líknandi samleika loysnum í øðrum londum. Tilgongdin fer at vara til oktober 2016, tá endaligt útbjóðingartilfar verða latin teimum undangóðkendu veitarunum.

Í stuttum skal veitari, sum ynskir at verða undangóðkendur, lúka hesi krøv:

- Kunna bjóða fram ein rakstrardepil í Føroyum, sum uppfyllir viðkomandi krøv í ISO/IEC 27001/27002
- Kunna bjóða fram eitt rakstrarumhvørvi við nøktandi útgerð
- Skipa sítt virksemi eftir trygdarstandardum
- Vísa á royndir við rakstri av skipanum, sum í vavi og kompleksiteti minnir um TS
- Skjalfesta, at starvsfólkini hava neyðugar førleikar at standa fyri rakstri av TS
- Hava innlit í føroysk viðurskifti og kjølfesti í Føroyum
- Vera fíggjarliga førur fyri at loysa uppgávuna
- Luttaka í felags uppbygging av vitan um rakstur og krøv til KT-trygd av líknandi loysnum

Veitarar, ið hava áhuga í at verða undangóðkendir, kunnu venda sær til Ann Damgaard, projektleiðara fyri TS á ann@handa.fo, fyri at fáa tilfar útflýggjað. Í tilfarinum eru krøvini útgreinað, og greitt verður nærri frá, hvussu umbønin til undangóðkenningina skal skjalfestast. Freistin at biðja um tilfar til undangóðkenning er 26. august 2016.

Undangóðkenningartilfarið, har veitarin skal skjalprógva at hann livir upp til ásettu krøvini, skal verða KT Landsins í hendi seinast 26. august 2016.